# Frágreiðing frá Barnaverndarstovu Føroya fyri árið 2014
## - grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini

## Innihald


1. UPPBÝTIÐ Í BARNAVERNDARTÆNASTUR ........ 2

2. SKRÁSETING AV MÁLUM ........ 3

3. HVUSSU BYRJA BARNAVERNDARMÁLINI? ........ 5

4. FÍGGING – KOSTNAÐUR AV BARNAVERND ........ 9

5. FOSTURFORELDRASKIPANIN ........ 13

6. MANNAGONGD OG BAKGRUND ........ 17

# 1. Uppbýtið í barnaverndartænastur

Barnaverndarlógin varð við árslok 2013 broytt soleiðis, at hvørt av barnaverndarøkjunum kring landið í minsta lagi skal fevna um 3000 íbúgvar. Minstakravið til íbúgvatal, sum upprunaliga var 1500, hækkaði sostatt munandi fyri at hvør einstøk barnaverndartænasta kundi fáa eitt breiðari støði at standa á, og gerast betri før fyri at handfara trupul og viðkvom mál.

Áðrenn henda broyting kom í gildi varð hildið, at tað var ein ávísur vandi fyri ógegni og vantandi rættartrygd í smáum eindum, og at størri eindir við vælskikkaðum fólki í umsitingini var gongda leiðin.

Landið er eftir hesa broyting býtt upp í 8 barnaverndarøki ella *barnverndartænastur*, sum er felagsheitið fyri barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting.

### *Uppbýti í barnaverndatænastur í 2014*

| Barnaverndarøki | Kommunur |
|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðuroyggjar | **Fugloyar**<br>**Klaksvíkar**<br>**Kunoyar**<br>**Viðareiðis**<br>**Hvannasunds**<br>**Húsa** |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | **Eystur**<br>**Fuglafjarðar** |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | **Nes**<br>**Runavíkar**<br>**Sjóvar** |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | **Sunda**<br>**Eiðis** |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | **Vestmanna**<br>**Kvívíkar**<br>**Vága**<br>**Sørvágs** |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | **Tórshavnar** |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | **Skopunar**<br>**Sands**<br>**Skálavíkar**<br>**Húsavíkar**<br>**Skúvoyar** |
| Barnaverndartænasta fyri Suðuroynna | **Hvalbiar**<br>**Tvøroyrar**<br>**Fámjins**<br>**Hovs**<br>**Porkeris**<br>**Vágs**<br>**Sumbiar** |

## 2. Skráseting av málum

Við árslok 2014 vóru 867 barnaverndarmál skrásett í hagtalsskipanini hjá Barnaverndarstovu Føroya.

Barnaverndarmál kunnu vera sera ymisk, og munur er á, hvussu arbeiðskrevjandi einstøku barnaverndarmálini eru. Mál snúgva seg oftast um vanliga ráðgeving, men talan kann eisini um børn, sum verða sett heiman móti viljanum hjá foreldrunum, ein sokallað umsorganaryvirtøka uttan samtykki.

Tað ber illa til at samanbera støðuna hjá einstøku barnaverndartænastunum, tí talið av málum fyri eitt einstakt ár sigur í sjálvum sær ikki so nógv. So hvørt vísa hagtølini tó, um talið av barnaverndarmálum broytist, og um fyriskipanirnar, ið barnaverndartænasturnar seta í verk, tæna sínum endamáli.

Hagtalsskrásetingin er skipað soleiðis, at hvørt barnið sær er skrásett sum eitt mál. Hetta merkir, at ein familja kann verða skrásett sum fleiri barnaverndarmál í skipanini, um stuðul verður veittur fleiri børnum í somu familju. Sí nærri um hagtalsskipanina á s. 19.

Vegna serligar umstøður í 2014, aftaná at onkur øki vóru løgd saman í samsvari við lógarbroytingina, stóðust ávísir trupulleikar í skrásetingini av nøkrum málum, sí viðmerking til talvurnar 3 og 4. Mett verður tó, at ársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av virkseminum kring landið í 2014.

## *Talva 1: Tal av barnaverndarmálum, 31.12.2014*

| Barnaverndarøki | Gentur yngri enn 18 ár | Gentur eldri enn 18 ár | Dreingir yngri enn 18 ár | Dreingir eldri enn 18 ár | Tils. | Børn og ung yngri enn 18 ár | Børn og ung 18-23 ár | Tils. | Mál í %av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 36 | 15 | 57 | 12 | 120 | 1.494 | 308 | 1.802 | 6,7 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 25 | 8 | 39 | 8 | 80 | 965 | 173 | 1.138 | 7,0 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 48 | 2 | 53 | 2 | 105 | 1.608 | 339 | 1.947 | 5,4 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 16 | - | 18 | 2 | 36 | 655 | 149 | 804 | 4,5 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 48 | 6 | 37 | 4 | 95 | 1.334 | 269 | 1.603 | 5,9 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 124 | 28 | 147 | 23 | 322 | 5.526 | 1.104 | 6.630 | 4,9 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 14 | - | 10 | 5 | 29 | 317 | 53 | 370 | 7,8 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 29 | 6 | 42 | 3 | 80 | 1.117 | 242 | 1.359 | 5,9 |
| Tilsamans | 340 | 65 | 403 | 59 | 867 | 13.016 | 2.637 | 15.653 | 5,5 |

Talvan vísir, at barnaverndarmál í % av barnatalinum er 5,5 fyri alt landið – sama miðaltal sum í 2013. Størsta økið, Tórshavn, liggur við sínum 4,9% nakað undir undir miðaltalinum fyri alt landið. Av økjunum annars hava Norðoyggjar (6,7%), Eysturkommuna og Fuglafjørður (7,0%) og Sandoyarøkið (7,8) fleiri mál í mun til barnatalið enn landstalið, meðan Sundalagið og Eiði hava færri mál í mun til barnatalið enn landið sum heild.

## *Talva 2: Tal av barnaverndarmálum í % av barnatali við árslok 2013 og 2014*

| Barnaverndarøki | 2013 | 2014 |
|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 6,5 | 6,7 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 5,4/6,5[1] | 7,0 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 4,9 | 5,5 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 4,4 | 4,5 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 5,3 | 4,9 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 6,0 | 5,9 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 6,1 | 7,8 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 6,3/3,3[2] | 5,9 |
| **Alt landið** | **5,5** | **5,5** |

[1] Í 2013 ávikavist Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna
[2] Í 2013 ávikavist Suðuroyar Barnaverndartænasta og Suðuroyar Sunnara Barnaverndartænasta

## 3. Hvussu byrja barnaverndarmálini?

Barnaverndarlógin fevnir sambært lógarviðmerkingunum um børn, ið liva undir viðurskiftum, sum skaða teirra heilsu og menning.

Við barnaverndarlógini ynskti lóggevarin, at barnaverndartænasturnar skuldu fáa møguleika at savna sína orku um tey børn í samfelagnum, sum hava tørv á stuðli og hjálp. Tí fevnir barnaverndarlógin ikki um trivnaðin hjá børnum yvirhøvur, og fevnir heldur ikki um brekað børn uttan so, at tey liva undir umstøðum, sum skaða teirra heilsu og menning.

Fyri at tryggja, at barnaverndartænasturnar fáa kunnleika um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið ikki eru nøktandi, er fráboðanarskylda ásett í barnaverndarlógini.

Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilur tó millum vanliga borgaran, ið kann vera ónavngivin, og tann, sum í starvi sínum hevur við børn at gera. I seinna førinum er kravið, at fráboðanin skal verða navngivin.Í sambandi við endurskoðanina av barnaverndarlógini var fráboðanarskyldan hjá fakfólki herd við virknaði frá 1. juli 2012. Fakfólk hava skyldu at boða barnaverndartænastuni frá, um so er, at tey hava kunnleika til, ella hava orsøk at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini.

Ásett er somuleiðis, at barnaverndartænastan skal siga fráboðaranum frá, hvørt fráboðanin er móttikin.

Soleiðis er ásett um fráboðanarskylduna í Barnverndarlógini:

“**§ 14.** Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

*Stk. 2.* Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.

*Stk. 3.* Fráboðast skal eisini eftir stk. 1 og 2 um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.

*Stk. 4.* Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.

*Stk. 5.* Barnaverndartænastan skal boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin er móttikin. Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, skal barnaverndartænastan boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin hevur ført til, at málið verður kannað, ella at fyriskipanir eru settar í verk sambært hesi lóg. Afturboðanin fevnir bert um tann, ið fráboðað er um.

*Stk. 6.* Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, kann barnaverndartænastan, tá tað hevur avgerandi týdning fyri, hvørja hjálp og stuðul fráboðari sbrt. stk. 1 kann veita barninum, kunna um, hvørjar fyriskipanir eru settar í verk.”

Ein fráboðan sambært hesi grein merkir ikki, at barnaverndartænastan hevur skyldu at seta fyriskipanir í verk. Barnaverndartænastan hevur bert skyldu at kanna og upplýsa málið, og um komið verður fram til, at tað ikki er grundarlag fyri at seta fyriskipanir í verk, skal barnaverndartænastan onki gera.

## *Talva 3: Nýggj barnaverndarmál í 2014 í mun til barnatalið*

| Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Íalt | Børn og ung 0-23 ár | 2014, mál í % av barnatali | 2013, mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 2 | 4 | 6 | 1.802 | 0,3 | 1,4 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 6 | 11 | 17 | 1.138 | 1,5 | 0,3/0,8[3] |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 5 | 2 | 7 | 1.947 | 0,4 | 1,0 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 1 | 7 | 8 | 804 | 1,0 | 1,2 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 7 | 8 | 15 | 1.603 | 1,0 | 1,0 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 24 | 33 | 57 | 6.630 | 0,9 | 1,2 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 5 | 3 | 8 | 370 | 2,2 | 1,6 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 3 | 3 | 6 | 1.359 | 0,4 | 0,3/0,2[4] |
| **Alt landið** | **53** | **71** | **124** | **15.653** | **0,8** | **1,5** |

Tilsamans vóru skrásett 124 nýggj mál í árinum –71 dreingir og 53 gentur. Samlaða talið av nýggjum málum í mun til barnatalið í øllum landinum var 0,8%. Økið, sum hevur havt størstu tilgongdina av nýggjum málum, er Sandoy. Tórshavn hevur somu tilgongd sum miðaltalið, 0,9%. Í hinum endanum finna vit Norðuroyggjar og Suðuroynna. *Viðmerking: Við tað, at tøl ikki eru tøk fyri Barnaverndartænastuna fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur, eru somu tøl sett inn, sum árið fyri.*

## *Talva 4: Endað mál í 2014*

| Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Íalt | Børn og ung 0-23 ár | Mál í % av barnatali ávikavist |
|---|---|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 0 | 5 | 5 | 1.802 | 0,3 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 2 | 3 | 5 | 1.138 | 0,5 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 8 | 8 | 16 | 1.947 | 0,8 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 5 | 5 | 10 | 804 | 1,2 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs komm. | 4 | 4 | 8 | 1.603 | 0,5 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 45 | 40 | 85 | 6.630 | 1,3 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 3 | 1 | 4 | 370 | 1,3 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 3 | 2 | 5 | 1.359 | 0,4 |
| **Alt landið** | **70** | **68** | **138** | **15.653** | **0,9** |

*Viðmerking: Við tað, at tøl ikki eru tøk fyri Barnaverndartænastuna fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur, eru somu tøl sett inn, sum árið fyri.*

[3] Í 2013 ávikavist Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna
[4] Í 2013 ávikavist Suðuroyar Barnaverndartænasta og Suðuroyar Sunnara Barnaverndartænasta

### *Talva 5: Hvør boðaði frá í 2014*

| Fráboðari | Íalt | %-býti |
|---|---:|---:|
| Foreldramyndugleikin | 50 | 23,8 |
| Foreldur uttan foreldramyndugleika | 4 | 1,9 |
| Barnið sjálvt | 1 | 0,5 |
| Skúli | 32 | 15,2 |
| Familja ella onnur, sum kenna familjuna | 7 | 3,3 |
| Dagstovnar, dagrøkt og frítíðarskúli | 12 | 5,7 |
| Løgreglan | 24 | 11,4 |
| Almannastovan | 4 | 1,9 |
| Psykiatriski depilin | 6 | 2,9 |
| Heilsufrøðingur | 18 | 8,6 |
| Kommunulækni | 8 | 3,8 |
| Ljósmóður | 1 | 0,5 |
| Onnur í heilsuverkinum | 7 | 3,3 |
| Annað barnaverndarøki | 8 | 3,8 |
| Barnaverndartænastan tekur málið upp sjálv | 18 | 8,6 |
| Onnur | 10 | 4,8 |
| **Íalt** | **210** | **100,0** |

Legg til merkis, at til ber at skráseta meiri enn ein fráboðara fyri hvørt mál.

Á talvuni omanfyri sæst, at 23,8% av teimum, sum fráboða eitt barnaverndarmál eru tey, sum hava foreldramyndugleikan av barninum. Foreldramyndugleikin er sostatt nógv størsti einstaki bólkur av fráboðarum. Leggja vit afturat foreldur uttan foreldramyndugleika (1,9%) og familju og onnur sum kenna familjuna (3,3%) umframt barnið sjálvt (0,5%), sæst, at ein munandi partur av øllum fráboðanum koma úr privata umhvørvinum hjá barninum.

Hin parturin av fráboðanum kemur frá yrkisliga umhvørvinum, sum barnið beinleiðis ella óbeinleiðis kemur í samband við. Tann yrkisbólkurin, sum fráboðar oftast eru skúlarnir, ið standa fyri 15,2% av øllum fráboðanum.

## *Barnið sum offur og hættislig atferð hjá barni*

Skeivleikar sum gera um seg í barnaumsorgan og uppaling kunnu verða býttir í tveir flokkar: harðskap og vanrøkt. Við harðskap verður meint við gjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menninginga hjá barninum. Við vanrøkt verður meint við ógjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum.

## Talva 6: Hvørjar vóru orsøkirnar til fráboðanirnar í 2014

| Orsøk til fráboðan | Tal av fráboðanum 2014 | Tal av fráboðanum 2013 | Tal av fráboðanum 2012 |
|---|---|---|---|
| **Vanrøkt:** | | | |
| Kenslulig/sálarlig vanrøkt | 117 | 119 | 154 |
| Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit | 59 | 67 | 67 |
| Vanrøkt í sambandi við skúlagongd | 26 | 16 | 21 |
| Likamlig vanrøkt | 8 | 3 | 5 |
| *Tilsamans* | *210* | *205* | *246* |
| **Harðskapur:** | | | |
| Kensluligur/sálarligur harðskapur | 19 | 35 | 30 |
| Likamligur harðskapur | 16 | 26 | 10 |
| Kynsligur harðskapur (ágangur) | 35 | 20 | 8 |
| *Tilsamans* | *70* | *81* | *48* |
| **Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda:** | | | |
| Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3 | 3 | 3 | 5 |
| *Tilsamans* | *3* | *3* | *5* |
| **Hættislig atferð hjá barninum** | | | |
| Barnið hevur trupulleikar í skúlanum ella vanrøkir skúlan | 27 | 35 | 28 |
| Misgerðir hjá barni, t.d kemur ikki til hús ásettar tíðir, tað biddar, rýmir, brýtur inn og ger herverk | 6 | 9 | 6 |
| Barnið fremur likamligan ella kynsligan harðskap móti øðrum barni ella vaksnum persóni | 9 | 8 | 5 |
| Barnið setur egna heilsu og menning í vanda | 19 | 28 | 15 |
| Barnið tekur rúsevni/rúsdrekka | 2 | 5 | 4 |
| *Tilsamans* | *63* | *85* | *58* |
| | | | |
| *Orsøkir til fráboðanir tilsamans* | *346* | *374* | *357* |

Gevið gætur, at til ber at skráseta meiri enn eina orsøk til fráboðan fyri hvørt mál.

Sambært § 44 skal eitt barn kunnast og hoyrast, um tess menning og búning loyvir tí, og um tað verður mett at vera til frama fyri barnið.

## Talva 7: Orsøkir til at fyriskipanir endaðu í 2014

| Orsøk til fráboðan | Tal |
|---|---|
| Endamálið rokkið | 46 |
| Viðurskiftini í heiminum eru góðkend | 46 |
| Fyriskipan nyttuleys | 10 |
| Barnið er fylt 18 ár | 12 |
| Familjan flutt av landinum | 17 |
| Systkin – ikki virkin í skipanini | 9 |
| Víst til annan myndugleika | 12 |

Gevið gætur, at til ber at skráseta meiri enn eina orsøk til, at eitt mál verður endað.

# 4. Fígging – kostnaður av barnavernd

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, var tað sambært barnaforsorgarlógini, barnaverndarnevndirnar, sum tóku avgerð í barnverndarmálum, meðan landið rindaði útreiðslurnar av málunum. Eitt av endamálunum við nýggju lógini var, at fáa greitt fíggjarligt ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á barnaverndarøkinum. Lógin ásetur tí, at kommunurnar bera kostnaðin av tí fyribyrgjandi partinum av barnverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðanlandið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorgnaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn, men kommunurnar gjalda brúkaragjald.

*Talva 8: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. íbúgva i 2014*

| Barnaverndarøki | Fólkatal | Kostnaður (kr.) | Kostnaður pr. íbúgva (kr.) |
|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 5.692 | 6.924.024 | 1.216 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 3.442 | 4.042.195 | 1.174 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 5.894 | 5.728.149 | 972 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 2.322 | 2.120.099 | 913 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 4.829 | 5.627.343 | 1.165 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 19.954 | 24.910.516 | 1.248 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 1.268 | 1.434.808 | 1.132 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 4.684 | 5.891.438 | 1.258 |
| **Alt landið** | **48.085** | **56.678.572** | **1.178** |

Í 2014 kostaði barnaverndarøkið sostatt slakar 57 mió. krónur fyri allar kommunurnar.

Kostnaðurin pr. íbúgva var í miðal fyri landið kr. 1.178. Sandoyggin og Eysturkommuna/Fuglafjørður og Vágarnar saman við Vestmanna og Kvívík høvdu á leið sama kostnað av barnaverndarøkinum pr. íbúgva sum miðaltalið fyri alt landið. Norðoyggjar, Tórshavn og Suðuroy lógu omanfyri miðaltalið í kostnaði, meðan barnaverndartænasturnar við Skálafjørðin og í Sundalagnum saman við Eiði lógu undir miðaltalinum.

Mestan kostnað fyri hvønn íbúgva hevði Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna (1.258 kr.) meðan barnaverndartænastan í Sundalagnum saman við Eiði hevði lægstan kostnað fyri hvønn íbúgva (913 kr.).

### Talva 9: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. mál í 2014

| Barnaverndar øki | Tal av málum | Kostnaður (kr.) | Kostnaður pr. mál (kr.) |
|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 120 | 6.924.024 | 57.700 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 80 | 4.042.195 | 50.527 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 105 | 5.728.149 | 54.553 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 36 | 2.120.099 | 58.891 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 95 | 5.627.343 | 59.235 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 322 | 24.910.516 | 77.362 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 29 | 1.434.808 | 49.476 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 80 | 5.891.438 | 73.643 |
| **Alt landið** | 867 | 57.027.086 | 65.775 |

Talva 9 vísir, hvussu nógv hvørt barnaverndarmál kostar í miðal. Fyri landið alt kostar hvørt barnaverndarmál sambært talvuni 65.775 kr. í miðal. Í Norðuroyggjum, Fuglafjarðar- & Eysturkommunu, Vágunum, Sandoynni, í Sundalagnum og við Skálafjørðin er miðalkostnaðurin fyri hvørt mál lægri enn landsmiðaltalið, meðan hann er hægri í Tórshavn og í Suðuroynni. Miðalkostnaðurin av hvørjum barnaverndarmáli er hægstur í Tórshavn, har uml. hálva ferð so høgur sum í Sandoynni, har barnaverndartænastan kostar minst fyri hvørt mál.

### Talva 10: Kostnaður av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu, tús. kr. í 2014

| Barnaverndarøki | Fosturforeldra-skipanin | Fyrisiting/ starvsfólk | § 15 fyriskipanir | Stovns-útreiðslur | Annað | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 1.827,782 | 1.712.634 | 1.779.249 | 1.604.359 | - | 6.924.024 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 824.805 | 1.573.556 | 994.344 | 649.490 | - | 4.042.195 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 653.358 | 1.400.671 | 2.111.955 | 1.544.165 | 18.000 | 5.728.149 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 561.254 | 1.168.706 | 206.316 | 76.323 | 107.500 | 2.120.099 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 1.774.481 | 1.779.609 | 1.832.933 | 240.320 | - | 5.627.343 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 11.001.367 | 5.518.559 | 4.555.901 | 3.826.690 | 8.000 | 24.910.516 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 327.227 | 364.789 | 706.702 | 36.090 | - | 1.434.808 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 1.947.373 | 2.035.246 | 1.450.843 | 404.976 | 53.000 | 5.891.438 |
| Íalt | **19.593.132** | **15.553.770** | **12.804.509** | **8.199.048** | **196.500** | **56.678.572** |

Talva 10 vísir kostnaðin av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu. Samlaða nýtslan í økinum var í 2014 56,6 mill. kr., í mun til 55,5 mill. kr. í 2013.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um:

- kostnað fyri starvsfólk í barnaverndartænastunum,
- samsýning til barnaverndarnevndirnar og
- kostnað av rakstrinum av Barnaverndarstovu Føroya.

Í summum økjum eru harumframt íroknaði familjuráðgevar, sálarfrøðingar og familjustuðlar í fyrisitingarkostnaðin, tá ið hesi eru í starvi hjá kommununi.

Nógv tann størsti parturin av útreiðslunum til Fosturforeldraskipanina er samsýning til fosturforeldur. Støddin á samsýningini til fosturforeldur verður ásett í kunngerð frá Almannamálaráðnum og við atliti til, hvussu krevjandi uppgávan er. Her verður millum annað tikið hædd fyri aldri á barni, og um møguligt er, at hava annað arbeiði eisini.

Við í upphæddina til § 15-fyriskipanir eru tald umlætting hjá fosturforeldur sambært § 15, stk. 1, pkt. 7. Sí talva 12.

### *Talva 11: Stovnsútreiðslur í 2014*

| **Útreiðsluslag** | **kr.** | **%-býti** |
|---|---:|---:|
| Bú- og viðgerðarstovnar, brúkaragjald | 7.311.880 | 89,2 |
| Eftirskúlar | 277.984 | 3,4 |
| Skúlagongd í Føroyum | 37.500 | 0,5 |
| Stovnsútreiðslur uttanlands | 458.422 | 5,6 |
| Útreiðslur í sambandi við samveru | 113.262 | 1,3 |
| **Íalt** | **8.199.048** | 100,0 |

Ein sundurgreining av stovnsútreiðslunum vísir, at nógv tær størstu útreiðslurnar standast av brúkaragjaldi í sambandi við bú- og viðgerðarstovnar, meðan smærri prosentpartar fara til stovnsútreiðslur uttanlands og til eftirskúlar og aðra skúlagongd.

Kostnaðurin at senda børn á viðgerðarstovn er ein landsútreiðsla, men barnaverndartænasturnar rinda, sum nevnt frammanfyri eitt brúkaragjald, sum Almannamálaráðið, sambært kunngerð, ásetur árliga.

*Talva 12: BVL § 15 - fyribyrgjandi fyriskipanir. Kostnaður í 2014*

| Útreiðsluslag | tús. kr. | %-býti |
|---|---:|---:|
| Familjuviðgerð ella líknandi stuðul | 4.154 | 32,5 |
| Stuðul í heiminum | 2.443 | 19,1 |
| Sálarfrøðilig hjálp | 2.154 | 16,8 |
| Aosialt ansingarpláss | 847 | 6,6 |
| Persónligur ráðgevi/stuðul til barnið | 1.926 | 15,1 |
| Umlætting hjá fosturforeldrum | 551 | 4,3 |
| Arbeiðsroynd ella líknandi | 399 | 3,1 |
| Sjúku-/misnýtsluviðgerð | 30 | 0,2 |
| Menna frítíðarvirksemi hjá barninum | 245 | 1,9 |
| Stuðul í egnum kamari/íbúð | 55 | 0,4 |
| **Íalt** | **12.804** | **100,0** |

Talvan vísir, at størstu útreiðslupostarnir eru til familjuviðgerð, sálarfrøðiliga hjálp, stuðul í heiminum og sosialt ansingarpláss. Hesar fýra fyriskipanir sambært § 15 í barnaverndarlógini standa tilsamans fyri 75% av útreiðslunum, sum verða latnar eftir lógargreinini. Møguleikarnir at veita børnum og familjum hjálp eftir barnaverndarlógini eru nógvir. Á talvuni sæst yvirlit yvir ymiskar fyriskipanir. Høvuðsreglan er, at so leingi tað gagnar barninum, so er grundarlag fyri eini fyriskipan.

Fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært § 15 í barnaverndarlógini er vanliga størsti parturin av barnaverndar-arbeiðinum. Einans tá tað ikki er møguligt við fyribyrgjandi fyriskipanunum at geva einum barni ella familju nøktandi hjálp, kann verða farið víðari til aðrar og meira víðgongdar fyriskipanir. Slíkar fyriskipanir kunnu m.a. verða at seta barnið heiman í fosturheim ella á stovn. Flestu avgerðir, um at flyta barnið úr heiminum, verða tiknar við samtykki frá foreldrunum. Hóast samtykki er fingið til vega, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Hetta er fyrst og fremst orsakað av, at tað við nýggju barnaverndarlógini varð mett neyðugt at styrkja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum.

# 5. Fosturforeldraskipanin

Kommunurnar stovnsettu eina fosturforeldraskipan fyri alt landið, tá tær settu Barnaverndarstovu Føroya á stovn í 2006. Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum á Barnaverndarstovuni.

Tá umstøðurnar í heiminum eru soleiðis, at tað ikki ber til hjá einum barni at verða búgvandi heima, verður kannað, um barnið kann setast í eina fosturfamilju. Atlit skulu fyrst takast til, um næstrarfólk kunnu góðkennast sum fosturfamilja.

Eitt fosturheim sambært barnaverndarlógini er at skilja, tá ið eitt barn verður sett heiman í eitt annað heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri tí í styttri ella longri tíðarskeið. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim, og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs.

Krøvini til fosturfamiljur vóru frá 1. juli 2012 broytt soleiðis, at næstringar ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, kunnu góðkennast sum fosturforeldur, um tey í ítøkiliga førinum eru egnað í mun til ávísa barnið. Sostatt eru ikki heilt somu krøv galdandi til hesi fosturforeldur sum til onnur.

Eitt barn kann setast til fosturs, tá ið:

1) foreldrini samtykkja, at barnið verður sett í fosturheim,
2) barnið ongan verja hevur,
3) barnið fyribils er undir barnaverndarnevndarinnar umsorgan uttan foreldranna samtykki.

Barnaverndarstova Føroya, Fosturforeldraskipanin, fær frá barnaverndartænastunum upplýsingar um barnið, og hvønn tørv barnið hevur, og skal so finna ta røttu familjuna til barnið.

Fosturforeldraskipanin hevði í 2014 umleið 100 góðkendar fosturfamiljur, sum høvdu børn til fosturs ella umlætting, ella sum vóru tilreiðar at taka ímóti børnum til fosturs ella umlætting.

Umráðandi er at finna fosturforeldrini, sum hóskar best til tað einstaka barnið. Tískil kemur fyri, at nakrar fosturfamiljur eru í skipanini, sum onkuntíð ikki hava børn. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera, at tað einstaka barnið ikki hóskar til hesar fosturfamiljur.

Eisini eru fleiri fosturfamiljur, sum verða nýttar til fleiri fyriskipanir. Til dømis, tá talan er um systkin, ella tá tað snýr seg um umlættingarfamiljur, sum hava fleiri børn í styttri tíðarskeið í senn.

Í 2014 komu 16 nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina. Av hesum var tað bert tann eina, sum ikki var góðkend.

### *Talva 13: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2014 – býtt eftir aldri*

| **Barnaverndarøki** | **0 til 6 ár** | **7 til 13 ár** | **14 til 18 ár** | **18 til 23 ár** | **Tils.** | **Herav netverk** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 1 | 5 | 0 | 0 | **6** | 2 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 1 | 1 | 2 | 0 | **4** | 0 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 0 | 0 | 2 | 0 | **2** | 0 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 0 | 2 | 0 | 0 | **2** | 1 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 2 | 1 | 4 | 3 | **10** | 4 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 5 | 17 | 11 | 3 | **36** | 10 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 0 | 0 | 1 | 1 | **2** | 2 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 3 | 0 | 3 | 0 | **6** | 2 |
| **Alt landið** | 10 | 28 | 24 | 8 | **68** | 21 |

Tilsamans 68 børn vóru til fosturs í Føroyum við árslok 2014. Av hesum var stívliga helvtin úr Tórshavnar kommunu. 21 av fosturbørnunum vóru til fosturs hjá fólki, sum eru í familju við barnið ella á annan hátt partur av netverkinum hjá barninum

### *Talva 14: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2014 - býtt eftir aldri og kyni*

| **Barnaverndarøki** | **0 til 6 ár** | | **7 til 13 ár** | | **14 til 18 ár** | | **18 til 23 ár** | | **Tilsamans** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **D** | **G** | **D** | **G** | **D** | **G** | **D** | **G** | **D** | **G** |
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 1 | 0 | 3 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | 2 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 0 | 1 | 0 | 1 | 2 | 0 | 0 | 0 | 2 | 2 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 2 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 0 | 2 | 0 | 1 | 2 | 1 | 1 | 3 | 3 | 7 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 5 | 0 | 11 | 6 | 8 | 2 | 1 | 3 | 25 | 11 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 1 | 0 | 0 | 2 | 2 | 1 | 0 | 0 | 3 | 3 |
| **Alt landið** | 7 | 3 | 15 | 13 | 14 | 7 | 3 | 6 | **39** | **29** |

Býtið millum dreingir og gentur, sum eru sett til fosturs við árslok 2014, vísir eina yvirvág av dreingjum fyri alt landið, nevnliga 39 dreingir og 29 gentur. Kynsbýtið í aldursbólkunum vísir, at fleiri dreingir enn gentur eru til fosturs í teimum yngru aldursbólkunum, meðan fleiri gentur enn dreingir eru í aldursbólkinum 19-23 ár.

### *Talva 15: Tal av børnum til umlætting 31. desember 2014 – býtt eftir aldri*

| **Barnaverndarøki** | **0 til 6 ár** | **7 til 13 ár** | **14 til 18 ár** | **18 til 23 ár** | **Tils.** |
|---|---|---|---|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 0 | 5 | 0 | 0 | **5** |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 1 | 0 | 0 | 0 | **1** |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 3 | 1 | 1 | 0 | **5** |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 1 | 2 | 0 | | **3** |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 0 | 2 | 3 | 0 | **5** |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 7 | 6 | 6 | 1 | **20** |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 0 | 2 | 0 | 0 | **2** |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 0 | 1 | 0 | 1 | **2** |
| **Alt landið** | 12 | 19 | 10 | 2 | **43** |

Talva 15 vísir, hvussu nógv børn vóru til umlætting við árslok 2014. Tilsamans 43 børn vóru til umlætting og størsti einstaki aldursbólkurin vóru tey millum 7 og 13 ár. Hin helvtin var javnt býtt í aldursbólkarnar 0-6 ár og 14 til 18 ár. Bert í onkrum einstøkum føri var viðkomandi eldri.

Tá ið viðurskiftini í heiminum ella hjá børnunum eru soleiðis, at ikki er neyðugt at seta tey til fosturs, men kortini hava tørv á umlætting, kunnu børnini koma í eina fosturfamilju til umlætting. Hetta merkir, at tey í styttri tíðarskeið búgva hjá fosturfamiljuni, men eru ikki umsorganaryvirtikin, og foreldrini hava framvegis foreldramyndugleikan og ábyrgdina av børnunum.

Mest vanliga er, at børnini eru eitt ella tvey vikuskifti um mánaðin til umlætting, men talan kann eisini verða um eitt ávíst tíðarskeið, meðan foreldrini eitt nú fáa viðgerð fyri misnýtslu o.l.

Ætlanin við umlætting er, at geva børnum og foreldrum nýggja orku. Koma børnini frá eini familju, sum ikki er so vælvirkandi á øllum økjum, kunnu tey síggja og kenna seg sum part av eini vælvirkandi familju, sum kann geva teimum umsorgan og upplivingar.

Tað kann vera trupult at finna fosturfamiljur til umlættingarfyriskipanir. Hetta er eitt orku- og tíðarkrevjandi arbeiði fyri fosturforeldraskipanina. Tað, at finna eina fosturfamilju til eitt barn, sum skal í umlætting, kann ofta hava við sær, at fosturforeldraskipanin skal vitja fleiri fosturfamiljur, áðrenn rætta fosturfamiljan verður funnin.

Umlætting er ein sjálvboðin fyribyrgjandi fyriskipan, skilt á tann hátt, at barnið ella familjan kann broyta meining eftir, at fosturfamiljan er funnin og ikki ynskja umlætting kortini. Møguligt er ikki at seta í verk umlætting uttan samtykki frá tí foreldrinum, sum hevur foreldramyndugleikan.

*Talva 16: Tal av børnum til umlætting 31. desember 2014 – býtt eftir aldri og kyni*

| Barnaverndarøki | 0 til 6 ár | | 7 til 13 ár | | 14 til 18 ár | | 18 til 23 ár | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | D | G | D | G | D | G | D | G | D | G |
| Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar | 0 | 0 | 2 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 3 |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | 1 | 2 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 2 | 3 |
| Barnaverndartænastan fyri Sunda- og Eiðis kommunur | 0 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 2 |
| Barnaverndartænastan fyri Vestmanna-, Kvívíkar-, Vága- og Sørvágs kommunur | 0 | 0 | 0 | 2 | 1 | 2 | 0 | 0 | 1 | 4 |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | 3 | 4 | 3 | 3 | 6 | 0 | 0 | 1 | 12 | 8 |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 |
| Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| **Alt landið** | 4 | 8 | 9 | 10 | 8 | 3 | 0 | 1 | **21** | **22** |

Fyriskipanin umlætting verður mest nýtt til aldursbólkin 7 - 13 ára gomul. Við ársenda 2014 var kynsbýtið millum børn, ið vóru til umlætting, sera javnt. Tórshavnar barnaverndartænasta hevur nógv flest børn í umlætting, meðan aðrar barnaverndartænastur bert høvdu okkurt einstakt barn til umlætting um hetta mundið.

# 6. Mannagongd og bakgrund

Tann 1. januar 2006 var barnaverndarøkið skipað av nýggjum, og samstundis varð Barnaverndarstova Føroya sett á stovn. Uppgávan hjá Barnaverndarstovu Føroya er m.a.:

- at umsita fosturforeldraskipanina
- at veita barnaverndartænastum og samdøgursstovnum holla vegleiðing og ráðgeving
- at virka sum ráðgevi hjá Landsstýrinum á barnaverndarøkinum
- at styrkja og samskipa barnaverndarøkið
- og at fáa til vega hagtøl og skipa fyri gransking og menning av økinum

Síðan Barnaverndarstova Føroya varð sett á stovn, hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa til vega hagtalstilfar. Byrjað var við fyrst at savna inn tilfar manuelt frá øllum barnaverndartænastunum í landinum. Barnaverndarstova Føroya hevur síðan, í tøttum samstarvi við barnaverndartænasturnar, nýtt eina hagtalsskipan, ið er ein dátugrunnur, og sum tølini í hesi frágreiðing eru tikin úr.

Barnaverndartænasturnar hava inntøppa upplýsingar í hagtalsskipanina um tey barnaverndarmál, tey hava, m.a. hvørjar fyriskipanir verða settar í verk, hvørjir trupulleikar eru, og hvør kostnaðurin í tí einstaka barnaverndarmálinum er. Í hagtalsskipanina verða teir upplýsingarnir inntøppaðir, sum barnaverndartænasturnar saman við Barnaverndarstovu Føroya hava mett vera av týdningi fyri at fáa innlit í barnaverndarøkið í Føroyum. Í hagtalsskipanini eru nógv fleiri upplýsingar inntøppaðir, enn henda frágreiðing fevnir um.

Við tað, at talan er um barnaverndarmál, er talan um sera privatar og viðkvæmar upplýsingar, umframt revsiverd viðurskifti. Dátueftirlitið hevur, við heimild í § 35, stk. 1, smb. § 9, stk. 1 og § 10, stk.1 í persónsupplýsingarlógini, givið loyvi til, at Barnaverndarstova Føroya kann viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í tilknýti til hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovuni. Loyvið til viðgerðina av persónsupplýsingum, er treytað av, at ásetingarnar í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni gjørdum broytingum, og kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í samband við persónsupplýsingar, verða hildnar.

### *Endamál*

Endamálið við hagtalsskipanini er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum.

Umframt hetta, hevur hagtalsskipanin eisini til endamáls at geva leiðslunum, ið vara av barnaverndarøkinum í Føroyum eina mynd av støðuni í einstøku barnaverndartænastunum við atliti til menning og betran. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu eisini nýtast sum grundarlag hjá kommununum, tá tær leggja til rættis kommunalpolitikkin.

Tá barnaverndarlógin varð sett í gildi 1. januar 2006, fingu allar barnaverndartænastur í landinum skyldu at lata upplýsingar um barnaverndarmál til Barnaverndarstovu Føroya. Barnaverndarstovan hevur ábyrgdina av hagtalsskipanini og hevur saman við KT-tænastuni hjá Tórshavnar kommunu sett upp eina trygga KT-skipan. Tann barnaverndartænastan, sum hevur eitt barnaverndarmál, hevur skyldu til at skráseta málið og tær hendingar, sum eru í málinum til Barnaverndarstovu Føroya. Til allar skrásetingar verður P-talið hjá barninum nýtt. Umframt at skráseta viðurskifti hjá barninum, verða eisini skrásettar upplýsingar um tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum.

## Trygd

Nógv verður gjørt burturúr, at hagtalsskipanin hjá Barnaverndarstovu Føroya skal vera so fullgóð sum møguligt fyri at tryggja, at skrásettu upplýsingarnar ikki koma óviðkomandi í hendi. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu einans nýtast til hagtals- og vísindalig endamál.

Hagtalsskipanin er m.a. tryggjað við einari trygdarváttan og eini kryptering í sambandi við ta elektronisku flytanina av dátum. Harumframt er viðgerðin fevnd av tekniskum og umsitingarligum trygdarkrøvum, soleiðis, at hvørt einstakt starvsfólk, sum arbeiðir við hagtalsskipanini, hevur fleiri persónlig loyniorð til skipanina. Skrásett verður eisini, hvør er inni á skipanini og nær, og hvat skipanin verður nýtt til. Somuleiðis er stórur dentur lagdur á, at eisini starvsfólkini í einstøku barnaverndartænastunum vísa umhugsni og ansni í sambandi við hagtalsarbeiðið.

## Óvissur

Barnaverndartænasturnar í landinum byrjaðu at inntøppa í hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovu Føroya í 2008. Av tí, at neyðugt var við eini royndartíð og upplæring fyri at tryggja, at skrásetingarnar verða gjørdar á sama hátt í øllum barnaverndartænastunum, varð ikki ráðiligt at almannakunngera hagtøl úr skipanini í 2008. 2009 var fyrsta árið, at Barnaverndarstova Føroya nýtti upplýsingar úr elektronisku hagtalsskipanini. Sjálvt um hugt hevur verið gjølla eftir, at upplýsingar í skipanini eru rætt inntøppaðir, kann full vissa ikki gevast fyri, at ongin feilir eru í upplýsingunum.

Sum nevnt frammanfyri stóðust ávísir trupulleikar í skrásetingini av nøkrum málum fyri 2014, sí viðmerking til talvurnar 3 og 4.

Fyri at tryggja, at upplýsingarnar í hesi frágreiðing eru rættar, er hendan frágreiðing, eins og undanfarin ár, send øllum barnaverndartænastunum til ummælis, gjøgnumgongd og góðkenning, áðrenn hon er almannakunngjørd.

Barnaverndarstova Føroya, desember 2015

Oddbjørg Balle, leiðari